# So langt sum vestur er frá



– Her er sera vakurt, her á Viðareiði, staðfestir Karl. Hann hevur júst verið og vitjað mostur sína

**– Nú gingu næstan 20 ár til eg var aftur á Viðareiði. Nú ætli eg mær skjótt norður aftur, sigur gásadalsmaðurin, Karl Mikkelsen. Í farnu viku var hann við á forvitnisligari ferð úr norðastu bygdini í Føroyum til heimbygdina – eitt strekki uppá 115,8 km. eftir asfalti!**

TUNNILSFERÐ

*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Gásadalur-Viðareiði t/r:** Hann hevði ikki lovað allarbesta veður henda hósdagin.

Boðað er frá regni av og á, eins og nakað av vindi. Men frá morgunstundini var kortini einki sum bendi á at veðurfrøðingarnir fóru at fáa rætt í sínum spádómum.

Skuldi ein sagt frá veðurlíkindunum í Gásadali hósmorgunin 20. apríl 2006 kl. 9:00 so vóru tey nøkurlunda hesi: Klárt í veðrinum, turt, eitt lítið lot og sólarglottar á Tindhólmi. Hitin um 5 stig.

Karl hevur bjóðað okkum heitt, gott og sterkt kaffi. Hetta munaði væl henda morgunin, og nú gera vit klárt at fara á longu og forvitnisligu ferðina úr Gásadali til Viðareiðis.

Ætlanin er at koyra – helst sum teir fyrstu nakrantíð – allan vegin av Viðareiði og aftur higar í einum.

Hugskotið spratt úr hugaheimi blaðstjóra Sosialsins, og skal nú setast í verk. Samband er fingið við ein av íbúgvunum í Gásadali, sum er sinnaður at gera hesa ferðina sum man fara at taka allan dagin.

Avtala er fingin í lag við NCC um loyvi at koyra gjøgnum tunnilin á heimleiðini. Og avtala er fingið við Elisabeth Nybo á Viðareiði um at hava reinsdjórakjøt á døgurðaborðinum fyri okkum kl. 12:30.

Nú er bert eftir at leggja til brots.

## Neyt og seyður

Vit fara frá húsunum hjá Karli ovast í bygdini, men sleppa ikki soleiðis avstað. Nei, hann vil fegin vísa fram neytini og seyðin í fjósi sínum.

Fjósið stendur fyrst í bygdini, og her sleppa vit at heilsa uppá nakrar av ferføttu vinum hansara. Hundurin er trúfasti fylgisveinur hansara allan vegin, men hann sleppur bert oman higar. So er hansara túrur liðugur.

Vit steðga á eina løtu, tí Karl hevur stóran áhuga fyri neytahaldi og umboðini fyri tíðindatænastuna vilja fegin hoyra meiri um líkindini fyri hesi vinnuni í Gásadali.

Nú er klárt at fara víðari á ferðini norðureftir. Hitt fjórða ferðafólkið sæst nærkast fjósinum, og vit leggja leiðina norðuryvir.

Prátið í bilinum fellur natúrliga inn á liviumstøðurnar í hesi vestastu bygdini í Vágoynni og munin á fyrr og nú. Tað skilst týðiliga á teimum báðum ferðafólkunum at tey harmast um støðuna, sum heimbygd teirra hevur verið fyri.

Fyrr var skúli, skúlabørn, lív og trivnaður í bygdini. Øll longdust eftir at fáa samband við umheimin, men tá vegasambandið umsíðir kom, var tað ovseint: Fólkini vóru longu flutt aðrastaðir.

Vit vita ikki rættiliga av fyrrenn vit hava koyrt gjøgnum tríggjar tunlar og nú stendur Kollafjørður fyri framman.

– Man Jákup nú standa her?, skimast kvinnuligi ferðagestur okkara.

Ein bilur stendur haruppi við tunnilsmunnan við tendraðum ljósum. Man tað vera hann?

Nei, tað er ikki hann. Tí maðurhennara hevur sett bilin beint við rundkoyringina, og her steðga vit so.

Hann fær konuna aftur, men ein sum man vera enn glaðari fyri heimkomuna, er hundurin í bilinum. Hann hevur ikki meiri enn fingið eygu á hana, so skilst at tey bæði eru vinir.

– Hey, sigur hon við hundin. – Kom her, besti hjá mammu síni!

Vit skiljast her við rundkoyringina. Tey bæði og hundurin fara til Havnar, meðan vit tríggir halda leiðina fram norðureftir til Leirvíkar.

## 5 og 200 húsarhald

Ferðin gongur gjøgnum Kollafjørð og víðari til Hósvíkar.

– Ja, nú komu vit so til Hósvíkar, siga vit.

Orðini eru ikki meiri enn søgd, tá vit fáa eygu á ein bil, sum beinanvegin vekur okkara áhuga. Undir einum húsum sunnarlaga í bygdini stendur ein bláur jeepur parkeraður: Postbilurin.

Her er frálíkur møguleiki hjá einum postmanni úr einum lítlum øki at skifta orð við ein postmann í einum stórum postøki.

Vit SNARa inn í bygdina júst sum postmaðurin hevur borið postin inn í næstu húsini. Tveir starvsfelagar taka í hondina á hvørjum øðrum.

Lokali postmaðurin greiður eitt sindur frá sínari rutu, og spyr so eftir rutuni í Gásadali. Hann er frammanundan greiður yvir, at her man munur vera á.

Sjálvur hevur hann um 200 hús á rutuni henda dagin, sum m.a. umfatar øll húsarhaldini í Hósvík. Tá er munur á at hava 5 ella 6 húski at fara til.

– Tað tók mær langa tíð at læra hesa rutuna at kenna. Men í dag dugi kenni eg alt frá Hvalvík til Kvívíkar, greiðir hann frá.

Karl spyr, um tað ikki er ringt at læra eina ella tvær so drúgvar rutur at kenna.

– Jú, tað var ringt at læra alt. Tað tók mær langa tíð, men í dag gongur tað sum einki.

– Her í Hósvík lættir tað eisini væl um, at allar gøturnar hava navn og húsini hvør sítt gøtunummar, sigur hann.

Teir práta saman eina løtu aftrat, men tíð er hjá okkum at halda leiðini fram til Leirvíkar. Nú hevði verið kærkomið við einum kaffimunni onkustaðni á leiðini.

## Gott við kaffi

Á Norðskála liggur Café Inn, og har man liggja fyri við einum kaffimunni ein slíkan fyrrapart. Men nei, – har letur fyrst upp kl. 11:30.

Í Skálafirði er bæði bensinsøla og kaffistova, so tað verður okkara næsta mál á ferðini. Tað er skjótt at kaffi og ein køkubiti standa á borðinum.

Vit skifta orð við ein mann úr Runavík, sum skal somu leið sum vit. Hann er NSÍ'ari um ein háls, tað vit vita. Hann situr nú og bíðar eftir bussinum úr Havn, sum skal føra hann víðari til Dúgvuna. Hann skal til skips sama dag.

Karl hevur fingið eyga á ein stóran gráan bygning inni í bygdini. Er hatta samkomubygningurin hjá Kelduni?

Jú, so er. Samkoman hevur megnað at bygt henda stóra bygningin og í løtuni verður arbeitt enn meiri við innrættingini.

Klokkuni er nú farin at